# matas

## Lærlingur og avloysari

Ert tú tann rætta/ rætti til okkara handil?

Til handil okkara í SMS søknast vit eftir einum lærlingi og einum avloysara til barnsburðarfarloyvi at byrja 5. mai.

**Vit bjóða**
Í lærutíðini fært tú eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving/arbeiðsgongd innan handil, vakurleikarøkt og heilsu.

Í Matas starvast 6 fólk og sum lærlingur/ avloysari, fært tú innlit í alskyns viðurskifti viðvíkjandi kundarøkt, sølu og innkeypi.

**Førleikakrøv**
Tað er eitt krav at lærlingurin hevur FHS-útbúgving, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og annars ert fyrikomandi og røkin.

Meira fæst at vita um starvið á tel 314888.

**Umsókn**
Skrivliga umsóknin, ið saman við próv-skjølum, skal vera okkum í hendi innan 4. apríl, kann sendast til:

**Matas**
Húsagøta · SMS · 100 Tórshavn
Att: Esther

SENDISTOVAN

Tel 31 48 88



## Sansir søkja **internetráðgeva**

Tú skalt ráðgeva kundum okkara í net- baseraðum loysnum so sum heimasíður, portalar og serloysnir innan KT. Tú verður prosjektleiðari og kemur at standa fyri spennandi samskiftisuppgávum, sum tú skalt loysa saman við kundunum og okkara dugnaligu starvsfólkum. Hetta merkir, at tú kemur at taka tær av ráðgeving og interaktiónssniði umframt samstarvi við sniðgevar og forritarar.

Tú skalt selja professionellar heildar-loysnir, sum byggja á okkara framkomna og brúkaravinarliga CMS, Sansir.net. Heildarloysnirnar fevna um ráðgeving, interaktiónssnið, grafiskt snið og implementering á Sansir.net. Tað verður tín ábyrgd at tryggja, at loysnirnar, vit skapa fyri okkara kundar, eru góðar og taka støði í mentanini og samleikanum hjá kundunum.

Vit kundu hugsað okkum, at tú hevur hóskandi útbúgving, eitt nú eina kandidat- ella bachelorútbúgving innan kunningarvísind, miðlar ella samskifti, ella tú hevur hollar royndir við netbaseraðum loysnum og CMS. Tú hevur lætt við at samskifta við fólk, tú dugir væl at hugsa í heildarloysnum, hevur gott eyga fyri visuellum samskifti og natúrlig evnir fyri handli. Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt og leiða tíni prosjekt, samstundis sum tú dugir væl at samstarva við tínar starvsfelagar.

Sansir eru ein framfýsin samskiftis-fyritøka við 40 starvsfólkum í trimum ymiskum londum. Av hesum arbeiða 11 fólk burturav við serloysnum til internetið. Vit skapa kunningar- og marknaðar-føringsloysnir í tøttum samstarvi við okkara kundar. Førleika- og útbúgvingarstøðið hjá fólkunum á Sansum er høgt og spennir víða. Grundarlag okkara fyri støðugari menning og framburði er persónligt rásarúm, virðing fyri fjølbroyttum hugsunarhátti og stuðul til persónliga menning hjá okkara starvsfólkum.

Heldur tú, at hetta ljóðar spennandi, so eigur tú at søkja starvið. Vónandi verður tað tú, sum vilt skapa framtíðina hjá Sansum saman við okkum. Sjálvandi fært tú eina góða løn.

Umsóknin skal sendast við telduposti til Tór Verland Johansen á verland@sansir.fo ella Elin Michelsen á elin@sansir.fo. Vinarliga viðmerk títt fartelefonnummar.

Vit skulu hava umsóknina í seinasta lagi kl. 16.00 mánadagin 7. apríl. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú ringja til Tór Verland Johansen á tel 238371 ella Elin Michelsen á tel 238373. Vinarliga ring millum 15.00 og 18.00. Tú kanst eisini senda fyrispurningar við telduposti til Tór Verland ella Elin.

SANSIR

Pf. Sansir
Dvørgastígur 7
Postmoga 1099
FO-110 Tórshavn
www.sansir.fo

# HANDILS- & RØRSMIÐJU LÆRLINGAR

Vit sóknast eftir einum handils-lærlingi og einum rørsmiðjulærlingi til høvuðsdeild okkara í Havn skjótast gjørligt…



TÓRSHAVN

SOZO

**Vit bjóða tær**
eitt áhugavert og spennandi læru-pláss við nógvum avbjóðingum, har vit raðfesta tænastu, góðsku og gott handverk í tí, vit gera.

Tú verður partur av vælvirkandi virki okkara við nógvum góðum og dugnaligum starvsfólkum.

Sum lærlingur á høvuðsdeild okkara í Havn fært tú góðar arbeiðsumstøður og kemur at arbeiða sjálvstøðugt og soleiðis geva títt íkast til virksemi okkara.

**Vit vænta,**
at tú ert nærlagdur, ágrýtin og røkin og setir avíkavist kundatæn-astu og gott handverk í fremstu røð. Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarðandi felag.

Fyrispurningar rørsmiðjulærlingur:
Torbjørn Hansen á torbjorn@demich.fo ella tel 30 93 10.

Fyrispurningar handilslærlingur:
Heini Joensen á heini@demich.fo ella tel 30 93 10.



Demich
Stiðjagøta 2
Postboks 378
110 Tórshavn

tel +298 30 93 10
fax +298 30 93 11
demich@demich.fo
www.demich.fo

demich

## Ov tíðliga í verðina

Í Prematurfelagnum stuðla og ráðgeva vit foreldrum at ov tíðliga føddum børnum.

Telefonlinja okkara svarar mánadag til hósdag á tlf 263868

Eisini ber til at skriva til okkara á premataur@post.olivant.fo